# Tímalønt skulu hava sama rætt sum øll onnur

**– Einasti máti at fáa hetta sett í verk, er at Løgtingið ger tað, tí arbeiðsgevarar vilja ikki gera tað við góðum, sigur javnaðarflokkurin, sum hevur lagt uppskot fyri tingið**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*



*– Tey tímaløntu skulu nú hava hava at vita, hvar tey flóta. Tí skulu arbeiðsgevarar nú geva teimum skrivligar upplýsingar um starvstreytirnar, heldur javnaðarflokkurin*

Nú skulu tímalønt hava líka góðan rætt sum fastlønt og onnur. Tað heldur javnaðarflokkurin.

Tí hevur flokkurin lagt uppskot fyri tingið um, at áleggja arbeiðsgevarum at geva hvørjum einstakum tímaløntum arbeiðsfólki eitt skriv við ymsum upplýsingum.

Uppskotið hevur verið til 1. viðgerð í tinginum, har undirtøkan var misjøvn og er nú beint í vinnunevndina til viðgerðar.

Gongur sum javnaðarflokkurin vil, skal arbeiðsgevari, í seinasta lagi tveir mánaðir eftir, at hann hevur sett fólk í arbeiði, har arbeiðstíðin kann væntast at vera minst 16 tímar í miðal um vikuna, og starvstíðin minst verður tveir mánaðir, geva geva løntakaranum skrivligar upplýsingar um nøkur grundleggjandi viðurskifti. Hevur løntakari ikki eina miðalarbeiðstíð, sum er meira enn 16 tímar um vikuna, tá ið hann verður settur í starv, kemur hendan upplýsingarskyldan hjá arbeiðsgevarunum í gildi, tá ið løntakarin tær seinastu átta vikurnar hevur havt eina miðalarbeiðstíð um vikuna, sum er meira enn 16 tímar.

Upplýsingarnir, sum arbeiðsgevararnir eru bundnir at geva arbeiðsfólki, eru sett upp í 10 punktum.

1. Navn arbeiðsgevarans og løntakarans.

2. Upplýsingar um, hvar arbeiðsstaðið er, ella, um talan ikki er um fast arbeiðsstað, so upplýsingar um, hvar arbeiðið í høvuðsheitum fer fram, og upplýsingar um, at løntakarin møguliga er starvsettur á ymiskum støðum, umframt høvuðsskrivstovu hjá arbeiðsgevara ella bústaði hansara.

3. Frágreiðing um arbeiði, starvsstøðu og møguliga starvsheiti løntakarans.

4. Nær starvsetanin tók við.

5. Hvussu leingi arbeiðið væntandi kemur at vara, um arbeiðið er tíðaravmarkað.

6. Rættindi løntakarans viðvíkjandi frítíð við løn og frítíðarískoyti.

7. Uppsagnarfreistir sum eru galdandi fyri arbeiðsgevara og løntakara.

8. Tann sáttmálaavtalaða ella millum partarnar avtalaða løn, sum løntakarin hevur rætt til, tá starvsetanin byrjar, umframt ískoyti, sum ikki er beinleiðis partur av lønini, t.d. eftirlønargjøld o.a. Harumframt skal arbeiðsgevarin upplýsa, nær lønin verður útgoldin.

9. Vanliga arbeiðstíðin hvønn dag ella hvørja viku.

10. Millumpartasáttmálar ella avtalur annars, ið eru galdandi fyri starvsetanina. Skal løntakarin uttanlands at arbeiða í meiri enn tveir mánaðir, skal skjalið við upplýsingunum verða honum í hendi, áðrenn hann fer avstað.

Men harafturat skal tann, sum fer uttanlands, hava hesar upplýsingar:

1. Tíðarskeiðið, har arbeiðið verður gjørt uttanlands.

2. Gjaldoyra, sum lønin verður útgoldin í.

3. Møguligir fyrimunir í peningi ella á annan hátt, sum eru eitt lið í uppihaldinum uttanlands.

4. Treytir í smbandi við, at løntakarin kemur heimaftur.

5. Neyðugu váttanir arbeiðsgevarans í sambandi við arbeiði uttanlands.

### Setast í gildi í ár

Javnaðarflokkurin ætlar, at lógin skal koma í gildi 1. meir í ár.

Flokkurin sigur, at lógin skal tryggja løntakarum eitt minstamark av upplýsingum og sostatt eisini veita honum eina betri trygd í starvsviðurskiftunum.

– Tað eru fleiri bólkar av løntakarum, sum longu við lógaráseting ella millumpartaavtalu í ávísan mun hava greiði á hesum viðurskiftum.

– Men í hesum førinum - sum í so nógvum øðrum - er tað tann størsti bólkurin á arbeiðsmarknaðinum, sum er serliga illa fyri, og sum so at kalla ongi rættindi hevur av tí slagnum, sum lógaruppskotið snýr seg um og tað eru tey tímaløntu, sigur javnaðarflokkurin.

# Ingeborg Vinther vónar at Løgtingið sigur ja

**– Vit eru tey einastu sum enn hanga í leysari luft, sigur hon**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*



*– Tað er bara í summum menningarlondum, at arbeiðsgevararnir hava so lagaligar treytir mótvegis teimum tímaløntu, sum í Føroyum, sigur Ingeborg Vinther*

– Eg vóni so hjartaliga, at Løgtingið sigur ja.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sum er størsta fakfelagið hjá tímaløntum, er ómetaliga fegin um, at uppskot er lagt fyri tingið sum áleggur arbeiðsgevarum at geva hvørjum einstøkum tímaløntum eitt skriv við upplýsingum um, hvørjum treytum tann tímalønti er settur í starv eftir. Sí grein aðrastaðni í blaðnum.

Ingeborg Vinther sigur, at allir aðrir starvsbólkar hava eina ávísa trygd í sínum starvsviðurskiftum við tað, at teir fáa setanarskriv við øllum neyðugum upplýsingum í.

– Tey einastu, sum eru dottin niður ímillum, eru tey tímaløntu.

Ingeborg Vinther sigur, at tá ið ein tímaløntur hevur verið í starvi í tveir ár, hevur hann 20 daga uppsagnartíð.

– Hetta er ásett í sáttmálanum, men tað verður verri enn so altíð hildið og tað kemur næstan ikki fyri, at arbeiðsfólk fáa upplýsingar um uppsagnarfreistir o.s.fr. Ingeborg Vinther sigur, at tey fægstu arbeiðsfólk eru í føstum starvi. Tey verða bara biðin til arbeiðis og biðin um at fara úr arbeiði aftur, tá ið tað passar arbeiðsgevarunum.

Hon sigur, at hon sjálv legði eitt líknandi uppskot fram, tá ið hon sat í tinginum, men tá varð tað felt.

– Síðani hava vit roynt at fáa slíkar reglar settar í gildi í samráðingum við arbeiðsgevararnar, men har var onki at gera.

Ingeborg Vinther sigur, at skulu tey tímaløntu fáa somu sømdir, sum øll onnur, er einasti møguleiki, at tað verður samtykt við lóg.

Hon vísir á, at hesa trygdina hava arbeiðsfólk í hinum Norðanlondunum.

Tað er eisini eitt ES krav, at arbeiðsfólk fáa eitt slíkt skriv við teimum grundleggjandi upplýsingunum í.

– Men nú vilja arbeiðsgevararnir ikki vita av hesum, tí tað er bara eitt ES krav og tað er ongin orsøk til at føra ES krøv inn á okkum.

– Men tað er bara tá ið tað er til okkara fyrimun. Er tað til teirra fyrimun, vilja arbeiðsgevararnir fegnir hava ES krøv sett í gildi í Føroyum, sum t.d. herfyri, tá ið teir mæltu til at seta ES kravið um, at tað skuldi bera til at flyta arbeiðsmegi runt í landinum, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað er fáa staðni, at tímalønt eru so illa tryggjað, hvat starvsviðurskiftum viðvíkur, sum í Føroyum. Tí heldur hon avgjørt, at uppskotið hjá javnaðarflokkinum skuldi verðið sett í verk.



# Pakkísur í Pakkhúsinum

**Hóskvøldið helt Klaus Kiesewetter sera áhugaverdan og livandi fyrilestur í Stóra Pakkhúsi í Vági. Evnið var ferðir hansara sum ferðaleiðari umborð á ferðamannaskipum við Antarktis. Væl av fólki hoyrdi fyrilesturin og sá hugtakandi ljósmyndirnar. Í dag er fyrilesturin í Norðurlandahúsinum**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*



*Klaus Kiesewetter helt sera áhugaverdan og livandi fyrilestur í Stóra Pakkhúsi í Vági hóskvøldið*

Klaus Kiesewetter kenna mong. Hann er týskari, men hevur búð í Føroyum í eini 19 ár. Í løtuni býr hann í Keypmannahavn. Í Føroyum er hann kendur sum maðurin handan lýsingarvirksemi, film og annað.

Seinnu árini hevur hann ferðast víða. Starv hansara sum ferðaleiðari og fyrilestrahaldari umborð á ferðamannaskipum førir hann víða.

### Ísur

Hóast yvirskriftin við pakkísi og pakkhúsi mest er orðaspæl, meira enn veruleiki, so er hetta ikki heilt av leið, tá fyrilesturin og ljósmyndirnar í Stóra Pakkhúsi hóskvøldi skulu lýsast.

Søguliga og rámandi greiddi Klaus frá, afturvið framúr góðum og hugtakandi ljósmyndum. Evnið var seinasta ferð hansara. Hon var við ferðamannaskipinum Bremen frá Argentina til Antarktis frá november til februar. Fuglar, ríkt djóralív, gamlar hvalastøðir og nútíðin. Og kuldi og ísur og serstøk náttúra. Frá fyrstu sjógørpunum, ið sigldu nýggjar leiðir, til ferðina við marglætisskipinum Bremen.

Ein heit frásøgn úr kuldanum á Suðurpólinum var tað, ið Klaus borðreiddi við.

Eini hálvthundrað fólk høvdu leitað sær í Stóra Pakkhús hóskvøldið, og tað er eingin loyna, at tað kann viðmælast fólki at leita í Norðurlandahúsið í dag, tá Klaus Kiesewetter aftur sigur frá ferð síni, tí fleiri fyrilestrar eru ikki á skránni á hesum sinni.

Sosialurin hevur komandi leygardag størri grein um ferðina, fyrilesturin og prát við týska føroyingin, ið siglir heimsins høv, bæði heit og køld.

# Altjóða kvinnudagur í Norðurlandahúsinum

**Norðurlandahúsið er aftur í ár karmur um Altjóða Kvinnudagin**

ALTJÓÐA KVINNUDAGUR
*Solby A. Eliasen*

Evnið á kvinnudegnum í ár er Framtíð Føroya. Allir kvinnuligir politikkarar í landinum fáa orðið. Tað verður upp til hvønn flokkin sær at býta tíðina í millum sín.

– Men tað verður helst fimtan minuttir til hvønn flokkin, sigur Inga Ellingsgaard, forkvinna í Kvinnufelagasamskipan Føroya.

Tað verður eisini høvi hjá fólkunum í salinum at seta spurningar. Kostnaðurin at koma inn er 50 krónur, og tað verður ókeypis kaffe. Restorff's Bryggjarí bjóðar øl í Dansistovuni.

– Tiltakið hevur næstan altíð verið í Norðurlandahúsinum, tað egnar seg best, sigur Inga.

Inga sigur eisini at, undirtøkan hevur verið góð øll árini. Og tað eru ikki bert kvinnur, sum luttaka.

– Onkrir menn hava eisini verið onkuntíð, og um teir hava positivan áhuga, so eru teir eisini hjartaliga vælkomnir, sigur Inga Ellingsgaard at enda.

# Føroya Postfelag hevur havt aðalfund

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Postfelag*

Føroya Postfelag hevur havt aðalfund.

Millum annað varð val av formanni, og einum nevndarlimi á skránni.

Tvey uppskot vórðu til formann, og var sitandi formaðurin Sunleiv Højgaard afturvaldur.

Nýggjur nevndarlimur er Finngerð Hansdóttir.

Nevndin hevur eftir aðalfundi skipað seg soleiðis.
Sunleiv Højgaard, formaður
Agnar Bech, næstformaður
Finngerð Hansdóttir, kassameistari

Hinir nevndarlimirnir eru:
Jákup Páll Mohr Mortensen

Johannes A. Ellingsgaard, sum var valdur tiltakslimur, er í nevndini fyri Elin Danielsen, sum er í farloyvi.

# Fólkaflokslistin í Eysturoy liðugur

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Eysturoyar Fólkafloksfelag er liðugt við uppstillingina. Fleiri nýggj valevni eru á listanum, og tveir av teimum fremstu frá seinastu valunum, Olaf Olsen og Kjartan I. Joensen, eru ikki á listanum.

Á seinasta løgitngsvalið varð Jógvan á Lakjuni valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Eysturoy. Valið frammanundan varð Kjartan I. Joensen valdur. Frá 1980 til 1994 umboðaði Olaf Olsen flokkin í Eysturoy. Í sjeytiárunum sótu fyrst Jógvan Sundstein og síðan Edmund í Garði, sáli, á tingi fyri Fólkaflokkin í Eysturoy, eftir at Poul Petersen hevði umboðað flokkin í oynni í ein mansaldur.

Listin hjá Fólkaflokkinum í Eysturoyr sær soleiðis út:

Rógvi Borðoy, sjómaður, Norðskála
Jón Eliasen, stjóri, Leirvík
Tummas í Garði, lækni, Strendur
Deirdre Hansen, lærari, Glyvrar
Hanna Jensen, lesandi, Gøta
Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, Fuglafjørður
Ragnar Olsen, bankamaður, Søldafjørður
Karl Vang, húsasmiður, Toftir

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 AUTOM. Skrás.: 07-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 182.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,4 TERRA Skrás.: 18-04-01 Km.: 7.000 Prísur: 145.600,- Garanti**
TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT. GEAR Skrás.: 19-05-98 Km.: 17.000 Prísur: 158.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B Skrás.: 15-06-98 Km.: 32.000 Prísur: 118.600,- Garanti*
TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL STW.TDI Skrás.: 03-09-99 Km.: 157.000 Prísur: 158.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 STATION Skrás.: 27-09-95 Km.: 107.000 Prísur: 73.600,- Sýnaður 11-00
TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL Skrás.: 09-11-98 Km.: 70.000 Prísur: 148.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,6 SEDAN Skrás.: 25-01-99 Km.: 52.000 Prísur: 116.600,- Garanti**
TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Skrás.: 19-08-99 Km.: 111.000 Prísur: 148.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL Skrás.: 14-01-98 Km.: 131.000 Prísur: 113.600,- Garanti*
TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI Skrás.: 29-04-99 Km.: 82.000 Prísur: 154.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA Skrás.: 22-07-98 Km.: 53.000 Prísur: 99.600,- Garanti*
TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA Skrás.: 04-06-98 Km.: 46.000 Prísur: 144.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,7 DIESEL Skrás.: 31-03-94 Km.: 176.000 Prísur: 58.600,- Sýnaður 02-01
TOYOTA CARINA 1,6 L/B Skrás.: 08-04-97 Km.: 83.000 Prísur: 95.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,6 STW. Skrás.: 01-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 115.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 XLI Skrás.: 12-06-96 Prísur: 89.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,7 TDI STW. Skrás.: 18-06-97 Km.: 135.000 Prísur: 87.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 STATION Skrás.: 25-07-96 Km.: 81.000 Prísur: 98.600,- Garanti*
FORD ESCORT 1,6 CLX Skrás.: 04-07-95 Km.: 98.000 Prísur: 56.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 L/B Sýnaður 10-00 Skrás.: 10-04-96 Km.: 72.000 Prísur: 98.600,- Garanti*
CITROEN ZX Skrás.: 24-05-95 Km.: 57.000 Prísur: 64.600,- Sýnaður 04-01
TOYOTA CARINA 1,6 SED. Skrás.: 30-03-95 Km.: 53.000 Prísur: 99.600,- Garanti* Sýnaður 09-01
SUZUIKI ALTO 1.0 Skrás.: 21-09-98 Km.: 31.000 Prísur: 63.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 SED. Skrás.: 20-12-95 Km.: 103.000 Prísur: 86.600,- Garanti* Sýnaður 09-01
FORD SIERRA 1,8 DIESEL Skrás.: 28-11-91 Km.: 217.000 Prísur: 38.600,-

VØRUVOGNAR
MAZDA E 2200 4X4 VØRUVOGNUR Skrás.: 14-10-96 Km.: 69.000 Prísur: 98.600,- Sýnaður 11-00
* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

STØKK INN Á GÓLVIÐ
REYNI SERVICE
Sosialurin - 311820




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040